

## Sálarligir trupulleikar og menningartarn

Týskvøldið í næstu viku fer sálarfrøðingurin Anette Løwert at halda fyrilestur fyri avvarðandi hjá menningartarnaðum við sálarligum trupulleikum. Fyrilesturin verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni klokkan 19. Tað eru Javni og Psykiatriski depilin, sum í felag skipa fyri tiltakinum. Psykiatriski depilin arbeiðir við at styrkja um viðgerðartilboðið til fólk við menningartarni, ið eisini hava sálarligar trupulleikar, og tað er í hesum sambandi, at danski sálarlæknin Anette Løwert kemur aftur á vitjan í Føroyum at halda fyrilestur. Endamálið við fyrilestrinum er at geva fólki størri kunnleika um evnið. Anette Løwert hevur drúgvar royndir. Hon er sálarlækni, kliniskur sexologur og rithøvundi. Hon hevur seinastu 17 árini arbeitt innan økið, eitt nú sum yvirlækni í fyrrverandi Vejle Amt. Hon situr harumframt í ymsum ráðum og nevndum, sum hava havt við hesi viðurskifti at gera. Anette Løwert hevur undirvíst bæði í psykiatri og sexologi fyri sjúklingum, avvarðandi og fakfólkum í Danmark, Noregi, Grønlandi og eisini í Føroyum. Hon hevur eisini skrivað tríggjar bøkur. Anette Løwert hevur verið knýtt at Psykiatriska deplinum sum konsulentur seinastu trý árini.

# Uttanríkisráðið lurtar eftir Umboðsmanninum

**Uttanríkisráðið fekk 14. septembur harða átalu frá Løgtingsins Umboðsmanni, tí ráðið hevði drálað og í ávísum førum ikki givið Sosialinum innlit í ymisk viðurskifti í ráðnum. Nú hevur ráðið boðað Umboðsmanninum frá, at ráðið fer at fáa tingini í rættlag**

INNLIT

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Eftir átalu frá Løgtingsins Umboðsmanni fer Uttanríkisráðið nú at finna útav, hvat hvørt einstakt fólk í ráðnum fær í løn, sum tað enn ikki hevur megnað at lata innlit í*

Tað tók Uttanríkisráðnum fýra mánaðir at geva Sosialinum innlit í ein part av umbøn um alment innlit.

Hetta átalaði Løgtingsins Umboðsmaður 14. septembur í ár. Tí hann metti ikki, at tøkniligu umberingarnar hjá Uttanríkisráðnum fyri ikki at geva innlit í viðurskiftini vóru haldgóðar.

Víðari átalaði Umboðsmaðurin, at ein partur av innlitinum – serliga lønarviðurskifti – lá eftir, og tað ger hann framvegis.

– Vísandi til viðmerkingarnar um, at ráðið ikki gav klagaranum innlit í allar tær upplýsingar, sum hann bað um, fari eg at mæla Uttanríkisráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar og lata meg frætta úrslitið av hesi viðgerð, segði Umboðsmaðurin í síni niðurstøðu.

### Kanna málið

Tað er hetta Uttanríkisráðið nú hevur svara Umboðsmanninum uppá og sigur seg hava tikið tilmælið til eftirtektar og fer at finna útav, hvørjar útbúgvingar starvsfólkini hava, og hvørji setanarviðurskiftini í ráðnum eru.

– Áðrenn 1. januar hevur Uttanríkisráðið gjørt yvirlit yvir hvørjar útbúgvingar einstaku fólkini í ráðnum, skrivar ráðið til Umboðsmannin.

– Nýggj setanarskriv verða latin øllum í ráðnum, skrivar Uttanríkisráðið eisini til Umboðsmannin.

Men hetta megnar ráðið ikki at seta nakra tíðarfreist á, tí ráðið veit ikki, hvussu langa tíð ein tílík tilgongd tekur.




## Faðirleikluturin í sambandi við fosturlát og fosturtøku

Skeið & almennur fyrilestur Elisabeth og Carl Sukkot, ið arbeiða innan felagsskapin "Tilflugten" í Danmark, fara at undivísa.

SKEIÐINI
Í Grúgvini í Lamba hósdagin og fríggjadagin 29. og 30. oktober, frá kl. 10.00 – 16.00.

ALMENNUR FYRILESTUR
Á Parnassinum á Hotel Hafnia leygardagin 31. oktober kl. 14.00.

MÁLBÓLKUR
- Starvsfólk innan sosiala økið, ið arbeiða við familjum
- Jarðamøður
- Læknar
- Lærarar
- Pedagogar
- Sálarfrøðingar
- Sjúkrarøktarfrøðingar
- Barnatænastur
- Barnaverndartænastur
- Samkomur og kirkjur
- Prestar og samkomuleiðarar
- Øll áhugað

TVEIRDAGASKEIÐ
Skeiðið er tveirdagaskeið. Tó ber til at tekna seg bert til annan dagin.

DAGAR
Hósdagur 29. okt. 2009 - kl. 10.00 - 16.00
Fríggjadagur 30. okt. 2009 - kl. 10.00 - 16.00

KOSTNAÐUR
Fyri báðar dagarnar: kr. 450,00
Fyri annan dagin: kr. 250,00
Íroknað: Skeiðtilfar og máltíðir.

TILMELDING
Hilda Viderø, Tel. 216785
Osla Sevdal, Tel. 745049
T-postur: diakon@kallnet.fo

Gjaldið fyri skeiðið skal flytast á kontu í Føroya banka 6460 – 423.829.1

KREA · TEL 60 80 80

føroya PROVITA

provita@provita.fo · www.provita.fo


# Bókaklubbin á størstu donsku bókamessuni

**Í døgunum 13.-15. novembur er Bókaklubbin hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags við á Bogforum. Bogforum er størsta danska bókamessan**

BÓKMENTIR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nógv spennandi er á skránni, og túført høvið at hoyra fleiri kendar rithøvundar: Johannes Møllehave, Håkan Nessar, Jan Guillou og Camilla Lackberg eru bara nakrir. Okkurt stuttligt verður eisini til børnini.

Bókamiðsøluni er saman við forlagnum Torgarð á bási nummar 16. Á básinum sigur Bárður Oskarson frá um bókina »Pól hin kuli giraffurin«, Og Jógvan Isaksen sigur frá bókini »Krossmessu« sí www.forlagettorgard.dk

Bókaklubbin luttekur á Bogforum fyri at gera vart við seg millum føroysku útisetarnar. Føroyingar, sum búgva niðri, vilja flestir at børnini skulu læra móðurmálið, og í hesum sambandi er bókin eitt sera hent amboð, sum er við til at styrkja barnið málsliga, sigur Bókaklubbin.

Bókaklubbin letur øllum áhugaðum ókeypis atgongumerki til messuna. Fyri at ogna sær atgongumerki, kanst tú fara inn á heimasíðuna www. bokaklubbin.fo og skráseta teg ella ringja til 317644 áðrenn 9. novembur.